# Peran í lagi hjá13-tals næmingum

**Fýra næmingar í tekniska skúla hava fingið 13 fyri eina bólkaverkætlan. - Tað góða samstarvið var orsøkin til, at tað gekk so væl, siga tey**

SKÚLI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Peran er í lagi hjá Bjarna Skaalum, Jyttu Olsen, Mortan Olsen og Benjamin Hansen. Tey hava fingið 13 fyri eina verkætlan um el-orku*

Ein bólkur úr SIT-1 í tekniska skúla í Havn hevur fingið 13 fyri eina verkætlan. Tey ganga á el-deildini. Í bólkinum vóru Bjarni Skaalum, Mortan Olsen, Jytta Olsen og Benjamin Hansen. Verkætlanin eitur "El orka í Føroyum".

Hesi fýra hava arbeitt við verkætlanini í tvær vikur. Tó hava tey ikki havt frí úr skúlanum til at gera verkætlanina.

- Vit fingu nakrar fáar tímar hvønn dag til at skriva verkætlanina, sigur Bjarni.

### Fyrsta próvtal

Tey lótu verkætlanina inn fríggjadagin 3. november og skuldu verja hana munnliga mánadagin eftir.

- Vit fingu 11 fyri uppgávuna, men fingu 13, tá ið vit vardu uppgávuna, sigur Jytta.

Tey fáa ein samlaðan karakter - eitt 13-tal -, sum fer beint í prógvið. Hetta er ein góð byrjan hjá teimum fýra.

- Vit eru sera glað og errin, sigur Mortan.

Nógv hugsa helst, hvat skal til fyri at fáa 13.

- Vit vóru sera málrættað og seriøs, og tí fingu vit eisini eitt gott úrslit. Vit arbeiddu eisini sera væl saman. Tað skal eitt ordiligt liðarbeiði til at fáa 13, tá ið vit eru fýra. Vit kendu ikki hvønn annan nakað serligt, áðrenn vit fóru í holt við hesa verkætlanina, sigur Bjarni.

### Framløgan 20 minuttir longri enn ætlað

- Vit fyrireikaðu okkum væl. Vit høvdu skrivað stikkorð niður og vistu, hvør skuldi siga hvat, sigur Jytta.

- Vit improviseraðu tó eisini nógv, og tað hevur helst bjargað okkum 13-talinum. Framløgan skuldi vera 20 minuttir, men hon varð einar 40 minuttir, sigur Bjarni.

Tey vita ikki heilt, hvat tey ætla eftir SIT-1. Tey hava møguleika at taka SIT-2, ella tey kunnu fara í læru.

- Eg fari at brúka hetta árið til at finna útav, hvat eg vil. Tá ið tað nú gekk so væl við hesari uppgávuni, hugsar tú sjálvandi um at fara handanvegin, sigur Bjarni.

Tey vilja fegin takka lærarunum fyri stórt hjálpsemi.

- Lærararnir hava hjálpt okkum væl. Eisini vilja vit fegin takka SEV. Vit høvdu samrøðu við Klæmint Weyhe og nýttu ein film hjá SEV, sum vit løgdu løg til í okkara Power Point framløgu, siga tey.

### SIT´arar eru ikki sibbar

Til endans vilja tey fegin jarða mýttuna um, at tað einans eru sibbarnir, sum ganga á tekniska skúla.

- Fólk halda, at tað eru einans tey, sum ikki tíma at ganga í skúla, sum fara á tekniska skúla. Serliga tey, sum ikki tíma tey skrivligu fakini. Vit halda tó, at støðið í okkara flokki er høgt. Tú brúkar eisini nógv tey skrivligu fakini á El-deildini. Tað er tó serliga støddfrøðiligt, siga tey øll.

Peran er í hvørt fall í ordan hjá hesum fýra 13-tals næmingunum.

## Rætting

Í grein okkara Jensina vann singer/songwriter var ein villa komin í. Vit skrivaðu, at Høgni Reistrup var kendur úr bólkinum Deja Vu. Hetta skuldi sjálvandi verið Lawetz. Vit biðja lesaran um at umbera okkum fyri hesa villu.

# Ungdómsvikuskifti á Glyvrum

Í vikuskiftinum verður ungdómsvikuskifti í Missiónshúsinum á Glyvrum. Romain Zannou úr Benin kemur til Føroya at tala á møtunum. Romain var í Føroyum í fjør, har ið han talaði til ársmøtini hjá Heimamissiónini. Nú kemur hann so aftur á klettarnar. Romain er vegleiðari og undirvísari hjá pastorum í heimlandinum Benin.

Tað er ungdómsnevndin í Glyvra Missiónshúsi, sum skipar fyri vikuskiftinum. Jeffri Johannesen úr Lamba hevur eisini verið við í arbeiðnum at fáa Romain aftur til Føroya.

- Vit eru fegin um at hava hann her aftur. Romain dugir væl at tala. Vit vóna serliga at røkka teimum ungu hetta vikuskiftið. Av tí sama verður sangur og øll møtini sum heild ungdómlig í stíli, sigur Jeffri.

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið byrjar møtið klokkan 20. Sunnudagin byrjar tað klokkan 18. Fyrireikararnir siga, at øll eru vælkomin.

*Móttøka*

*Í samband við, at Sofus Clementsen tók við starvinum sum stjóri á Pf. Postverk Føroya 1. oktober 2006, verður almenn móttøka á Frímerkjadeildini, Traðargøta 38, Argir, fríggjadagin 17. november 2006 frá kl. 16.00 til 18.00*



*Nevndin í Pf. Postverk Føroya*

Postverk Føroya